UTTAN ÚR HEIMI

## Heitasta árið nakrantíð

Tað hevur ongantíð verið so heitt á norðaru jarðarhálvu sum í ár, siga bretskir granskarar, sum eru komnir eftir, at meðalhitin í ár hevur verið 0,65 stig oman fyri meðalhitan í árunum frá 1961 til 1990. Tølini vísa eisini, at 2005 er tað næstheitasta árið á allari Jørðini, síðani hitamátingarnar byrjaðu í 1860-unum. Bara 1998 var heitari, men tað árið vórðu viðurskiftini ávirkað av kyrrahavsfyribrigdinum El Nino, siga teir bretsku granskararnir.

Um orsøkina til, at hitin veksur skjótari á norðaru jarðarhálvu enn á teirri syðru siga granskararnir, at hetta kemst ivaleyst av, at meginparturin av norðaru jarðarhálvu er land, meðan tað mesta sunnanfyri er hav. Men høvini norðanfyri eru eisini heitari nú enn fyrr, og sambært David Vimer, granskara er norðari partur av Atlantshavinum heitari nú, enn hann hevur verið seinastu 125 árini.

David Vimer og felagar hansara viðganga, at teirra mátingar eru kanska ikki heilt neyvar, men hinvegin ivast teir ikki í niðurstøðuni, sum er, at tað gerst altsamt heitari á Jørðini. Teir ivast heldur ikki í, at dálkingin er høvuðsorsøkin til tann veksandi hitan.

## Velja tey sum ikki roykja

Fleiri norskar fyritøkur leggja seg eftir at fáa starvsfólk, sum ikki roykja, og tað hendir meiri enn so, at fyritøkurnar gera vart við tað, tá tær søkja eftir fólki, skrivar Dagsavisen.

Tað gjørdi handilsketan Hjem til dere, tá hon herfyri søkti eftir fólki. Úrslitið varð, at millum 80 og 90 prosent av umsóknunum komu frá fólki, sum ikki roykja, og tað vóru eisini tvey av hesum, sum vórðu sett í starv. Leiðarin í handilsketuni sigur við Dagsavisen, at tey hava ongan roykjara í arbeiði, tí tað er best fyri viðskiftafólkini hjá fyritøkuni. Harafturat hevur tað víst seg, at sjúkradagarnir hjá starvsfólkunum eru færri, tá eingin roykir.

Ein av teimum stóru norsku fyritøkunum, sum vil hava fólk, sum ikki roykja, er Norske Shell. Fyritøkan sigur ikki beinleiðis, at umsøkjarar skulu ikki roykja, men ger í lýsingunum vart við, at arbeiðsumhvørvið er roykfrítt, og tey boðini kunnu neyvan misskiljast.

## Ísbjørnindruknar

Tann seinasta mánaðin hava vísindafólk funnið fýra deyðar ísbjarnir í amerikanska statinum Alaska, og vísindafólkini ivast ikki í, at tær eru druknaðar, skrivar blaðið The Sunday Times.

Tann veksandi hitin á Jørðini ger, at ísurin minkar nógvastaðni, og tí noyðast ísbjarnirnar at svimja longri enn fyrr fyri at leita sær eftir føði. Úrslitið er, at summar teirra drukna, og vísindafólk bera ótta fyri, at uppaftur fleiri fara at drukna í komandi árum. Amerikanski vísindamaðurin Steven Armstrong sigur við The Sunday Times, at tað er eingin trupulleiki hjá einari ísbjørn at svimja nakrar fjórðingar, men at teinurin kann gerast ov langur, nú ísurin minkar.

Hildið verður, at tað eru umleið 20.000 ísbjarnir í teimum arktisku økjunum kring Norðpólin.

## Kappast um norðlýsið

Tað var tann tíð, tá fremmand ferðafólk komu til norska býin Tromsø at síggja norðlýsið á himmalinum, men nú eru finnlendingar farnir við næstan øllum gestunum, skrivar Aftenposten.

Tey seinastu árini hava finnlendingar gjørt nógv burtur úr at marknaðarføra tann norðasta partin av landinum sum ferðamál, tí har kunnu gestirnir fáa høvi at síggja norðlýsið á himmalinum. Tað hevur havt við sær, at fólk koma úr øllum ættum, og nú vitja umleið 500.000 fólk Rovaniemi á hvørjum ári. Men tey fáa eisini annað enn sjálvt norðlýsið burtur úr ferðini, tí í Rovaniemi er stutt sagt alt, sum ferðafólk kunnu hugsa sær.

Nú ætlar Tromsø at taka dystin upp við Rovaniemi. Eitt nú er ætlanin at skipa beinleiðis flogsamband ímillum Tromsø og Japan, tí tað eru serliga japanar, sum eru hugtiknir av norðlýsinum. Fyri nøkrum árum síðani plagdu umleið 5.000 japanar at vitja Tromsø á hvørjum vetri, men í vetur koma bara 1.500. Men nú skal vend koma í.

# Eldur kom í flogfar



*Amerikanskir myndugleikar kanna, hvat hendi, tá eitt vatnflogfar datt niður stutt sunnan fyri Miami fyrrakvøldið. Øll tey 19 fólkini, sum vóru í flogfarinum, doyðu. Eygnavitni hava greitt frá, at eldur kom í annan vongin, og løtu seinni datt flogfarið niður. Samveldisløgreglan kunngjørdi í gjár, at hon vil hava vissu fyri, at talan var ikki um eina yvirgangsatsókn. Á myndini síggjast kavarar, sum eru á veg at leita eftir teimum, sum vóru í flogfarinum.*

# Enn svølta børn í Niger

**Hjálparfelagsskapurin Læknar Uttan Landamark sigur, at nógv børn í Niger fáa ov lítið at eta. Stjórnin avsannar, at børn líða neyð**

HUNGUR

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Í summar bóðu fleiri hjálparfelagsskapir altjóða samfelagið um hjálp, tí fleiri milliónir fólk í afrikanska landinum Niger høvdu ov lítið til matna. Støðan batnaði seinni, tí heystið royndist rættiliga væl, men nú rópar felagsskapurin Læknar Uttan Landamark aftur neyðarróp.

-Eftir einari viku hava vit viðgjørt næstan 1.300 børn, sum høvdu fingið ov lítið at eta. Tað er næstan líka ringt sum í summar, og útlitini er ikki góð, sigur felagsskapurin í einari fráboðan. Sagt verður, at nógv fólk máttu læna pengar fyri at keypa sær mat í heyst, men nú hava tey ongar pengar eftir, og tí hava tey ov lítið til matna.

ST hevur biðið um 19 milliónir dollarar til at hjálpa teimum líðandi í Niger, men stjórnin har sigur, at altjóða samfelagið og hjálparfelagsskapirnir gera alt ov nógv av. Stjórnin vil vera við, at tað er ov mikið til av mati í landinum, men BBC sigur tvørturímóti, at allar matgoymslurnar eru tómar.

Læknar Uttan Landamark sigur, at teirra fólk hava viðgjørt meiri enn 58.000 børn í Niger í ár, og at tað eydnaðist at bjarga meiri enn 54.000 teirra. Felagsskapurin hevur í dag meiri enn 1.100 fólk í arbeiði í Niger.

# Bóghvítuhvalurin mest eitraða djórið

**Norskar kanningar vísa, at tey seinastu djórini í føðiketuni hava sera nógv eitrandi evni í sær**

DÁLKING

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Higartil hevur verið hildið, at ísbjørnin er tað mest eitraða djórið, men nú vísa kanningar hjá norska pólgranskingarstovninum, at tað er bóghvítuhvalurin, sum hevur mest eitrandi evni í sær. Men næstur honum kemur ísbjørnin, og henni á baki koma pólmási og kópur.

-Djórini ovast í føðiketuni hava sera nógv eitrandi evni í sær. Tað ger, at tey tola minni og minni eitur, og hetta saman við tí veksandi hitanum kann gerast ein hóttan ímóti hesum djórasløgunum, sigur Kim Holmén hjá norska pólgranskingarstovninum við Dagbladet.

Í heimsnáttúrugrunninum WWF ivast tey ikki í, hvaðani tað nógva eiturið í djórunum stavar.

-Hvønn dag lata vit umleið 80.000 gjørd, evnafrøðilig evni út í náttúruna, og enn vita vit ikki, hvørja ávirkan 85 prosent av teimum hava. Tey kunnu elva til krabbamein, oyðileggja okkara verjuskipan og ávirka okkara kynslív, sigur Rasmus Hansson hjá WWF við Dagbladet.